# Posta Stamps

Føroyar Nr. **52**

Mai 2022



Posta
FAROE ISLANDS

**Mineral & grótsløg**

**Endasøla**

**Árbók og ársmappa**

# Føroysk mineral

# Óslípaðir gimsteinar




Um vit hyggja nærri at tí gráa grótinum birtist eitt hav av flottum litríkum og spennandi mineralum í storknaða gosgrýtinum. Tey sjónskastu mineralini eru teir hvítu soðsteinarnir og kvartsmineralini.

Hesi vøkru mineralini úr Føroyum hava gjøgnum tíðirnar verið savnaði og víst fram á grótsøvnum um allan heim. Í øldir hava vísindafólk og ævintýrarar ferðast til Føroya við júst hesum endamáli, at savna mineral. Tær elstu skjalfestu vísindaligu ferðirnar eru frá seinast í 1700 talinum, og ferðirnar halda fram í dag.



## Nýggj bók um føroysk mineral og grótsløg

Í sambandi við at ein nýggj bók kemur út um "Føroysk mineral & grótsløg", setir henda frímerkjarøðin ljóskastaran á tvey mineral. Bókin er tann fyrsta av hesum slag, sum neyvt lýsir føroysk mineral og grótsløg. Tað finnast tó aðrar bøkur, t.d. hjá føroyska jarðfrøðinginum Jóannes Rasmussen, sum vísir eitt úrval fram av mineralum og grótsløgum. Tað finnast eisini nógvar vísindaligar greinar, sum greiða frá, hvar ið grótsløgini finnast, og hvørjar jarðfrøðiligar søgur mineralini siga frá.

*Ljós, sum skínur ígjøgnum Kalsittkrystall brotnar í tvær ættir. Mynd: Finnur Justinussen.*



## Mineralini

Tey bæði mineralini í hesi fyrstu røðini eru kalsitt (kálkspatt) og kopar. Tað, tey hava í felag, er, at tey eru sokallað sekunder mineral. Tað merkir, at tey vórðu krystallað, eftir at tann flótandi

grótbræðingin storknaði. Hesi mineral verða útskild í smá op og rivur í grótbræðingini. Tey krystallast úr tí mineralríka grundvatninum, sum rennur gjøgnum tað storknaða basaltið.

Kalsittkrystallið er partur av savni, sum Edna Einarson eigur. Hetta stórsligna savn hevur hon savnað í føroysku náttúruni, meðan hon í nógv ár hevur arbeitt hjá byggifelagnum NCC, tá ið tey hava borað undirsjóvartunlar í Føroyum.

Koparkrystallið hevur Johan Virgarsson funnið, tá hann arbeiddi í einum grótbroti í Suðuroy. Við sínum serstaka ansi fyri staklutum í tí sundurbrotna grótinum, fekk hann eyga á ein heilt serligan fund um summarið í 2020. Tá rakti hann við eitt av sjáldsamastu mineralfyribrigdunum í Føroyum: blaðformað kopar í stórum nøgdum.

## Kalsitt ($CaCO_3$)

Kalsitt, eisini kallað kálkspatt, er eitt kalsiumkarbonat ($CaCO_3$), og er eitt vanligt sekundert mineral í Føroyum. Kalsittkrystallini eru ofta klár ella hvít og minna rættiliga nógv um onnur mineral í Føroyum. Kalsitt hevur tann serliga eginleika, at tað fær ljós, sum skínur ígjøgnum krystallið, at brotna í tvær ættir. Kalsittkrystallini reagera eisini rættiliga virkið við veikari saltsýru (HCl), sum verður brúkt til at eyðmerkja mineralið. Kalsitt er flúrglógvandi, og tað sæst, um ein varpar ultraviolett ljós á mineralið í myrkri.

## Kopar (Cu)

Kopar er eitt málmmineral, sum bara er gjørt av grundevninum Cu (kopari). Tað er sjáldsamt at finna sum málmur í Føroyum. Vøksturin er ofta sum greinavøkstur (*dendritiskur*) ella í tunnum flakum, sum sæst á frímerkinum. Kopar hevur sera eyðkendan lit, sum verður brúktur til at eyðmerkja mineralið.

Kopar er áður funnið eitt nú í Nólsoy, Sandoy og Suðuroy, men so stórir koparfundir við so vøkrum krystallum, sum Johan Virgarsson fann í 2020, eru ikki sæddir fyrr í Føroyum.

*Jarðfeingi*

*Kopar er sjáldsamt at finna sum málmur í Føroyum.*



**Sjáldsama koparkrystallið,**
sum Johan Virgarsson fann í Suðuroy

Jólafrímerkini 2022

# Jól & advent







Adventskransur




Jólatræ
Listafólk: Heiðrik á Heygum

Siðurin við jólatrænum vit kenna í dag, stavar eins og adventskransurin úr Týsklandi.

## Adventskransurin

Fyrsta kertiljósið í adventskransinum skal tendrast fyrsta sunnudag í advent. Annan adventssunnudag skulu tvær kertur kveikjast – triðja tríggjar – og at enda, fjórða sunnudag í advent, skulu øll fýra kertiljósini brenna. Ein vakur og vaksandi jólasiður, har mongdin av ljósum veksur í tráð við mennandi vetrarmyrkrið og røkkur hæddina áraka vetrarsólstøðu og jólum.

Men siðurin at brenna adventskrans er ikki so gamal sum man skuldi trúð. Hann verður tilskrivaður týska teologinum Johann Hinrich Wichern (1808-1881), stovnaranum av heimamissiónini, sum umframt missiónina, skipaði fyri sosialum hjálpararbeiði í fátækum býarpørtum í núverandi Týsklandi.

Tá børnini í missiónsskúlanum "Rauhes Haus" í Hamburg, dagliga spurdu hvussu leingi tað var til jóla, setti Wichern fýra stór hvít kertuljós á eitt gamalt vognhjól - og 20 minni reyð ljós ímillum tey. Tey stóru ljósini ímyndaðu sunnudagarnar í adventini – og tey smáu gerandisdagarnar teirra millum. Hetta gjørdist ein fastur jólasiður á skúlanum og í 1860 byrjaði Wichern at prýða hjólið við grannkvistum – eftir hvat sigst, tí tað minti hann um tornakrúnuna hjá Kristus á krossinum.

Siðurin breiddi seg skjótt í Týsklandi og út um landamørkini. Undir fyrra krígnum kom hann til Suðurjútland, haðani hann spakuliga breiddi seg til restina av landinum. Undir seinna heimsbardaga, gjørdist adventskransurin vanligur í Danmark – og haðani er hann allarhelst komin til Føroya.

## Jólatræið

Ein tann mest ikoniski jólasiðurin er pyntaða jólatræið - oftast ævigrøna granntræið - sum verður sett upp í stovuni og pyntað við jólapyntinum hjá húskinum. Ljós, flættað jólahjørtu, kramarhús, fløgg, marglittar kúlur, stjørnur og kanska ein eingil ella tveir – umframt "einglahár". Oftast verður ein stór stjørna fest á trætoppin – Lívsins træ undir Betlehemstjørnuni so at siga.

Siðurin við jólatrænum, vit kenna í dag, stavar sum adventskransurin, úr núverandi Týsklandi. Møguliga við íblástri frá enn eldri siðum, byrjaðu handverkarafeløg í Týsklandi í 16. øld, at skipa fyri jólaveitslum fyri børnum. Savnandi miðdepilin í veitslunum var eitt pyntað granntræ við gávum til børnini. Siðurin breiddi seg og brátt byrjaði borgarastættin at stilla eitt pyntað jólatræ í stovuna á jólum. Í 1632 sigur ein skriftlig kelda fyri fyrstu ferð frá kertuljósum á jólatrænum – ein siður, ið hevur hildið sær til okkara dagar. Tó eru kertuljósini skift út við elektriskar ljóskeldur, orsakað av eldsváða.

Jólatræið breiddi sínar greinar út yvir týsku landamørkini, og keldur vilja vera við, at fyrsta jólatræið í Danmark varð sett upp á góðsinum Holsteinsborg á Suðursælandi í 1808. Siðurin breiddi seg til presta- og borgarastættina í 1800 talinum og festi rót millum vanlig fólk umleið fyrra heimsbardaga.

Fyrsta føroyska jólatræið stóð, eftir hvat skilst, í prestagarðinum í Sandagerði í Havn, stutt fyri fyrra aldamótið. Eisini her heima breiddi siðurin seg so líðandi til presta- og borgarastættina, allarhelst serliga millum donsk embætisfólk í Havn.



Í 1912 lýsir blómuhandlarin Trond-Hansen við jólatrøum fyri 35 oyru í Dimmu.

Undir seinna kríggi var trupult at fáa jólatrø til landið, so hugflogið mátti brúkast. Onkur hevur sagt frá jólatrøum, eftirgjørd við hømilium, niðurfalnum greinum og øðrum tøkum tilfari. Eftir kríggið, í fimtiárunum, gjørdist jólatræið fastur táttur í flestu føroyskum heimum.

## Myndevnini

Ársins jólafrímerki avmynda ávikavist adventskransin (19KR) og jólatræið (29KR), bæði við livandi kertum. Um íblásturin til evnisvalið sigur listamaðurin, Heiðrik av Heygum, soleiðis frá:

*"Eg bleiv biðin um at gera tvey jólafrímerki við íblástri úr søguni um føroyska adventskransin og jólatræið.*

*Jólatræið og advenskransurin eru lutfalsliga nýggir jólasiðir fyri føroyingar, og møguliga næstan líka nýggir fyri okkum sum føroyska myndlistin. Føroyingar tóku hesar prýðiligu jólasiðirnar til sín – adventskransin uml. 1940 og jólatræið fyrst í farnu øld, og nøkur ár seinni byrjaði føroyska myndlistin av álvara at blóma. Her vóru millum annað listafólk sum William Heinesen og Elinborg Lützen, ið gjørdu vart við seg, og hava havt stóra ávirkan á tann føroyska visuella samleikan. Teirra tveydimensionellu myndlýsingar av føroyskum sagnum og ævintýrum við klippi og prenti, eru vit allir føroyingar uppvaksnir við og kenna.*

*Jólini eru siðbundin, afturlítandi, nostalgisk og tætt hjartanum. Tí helt eg, tað var hóskandi at lýsa jólasiðirnar við einum siðbundnum brái, har eg samstundis fagni visuellu stílunum hjá Williami og Elinborg."*

*Anker Eli Petersen*





**Sett maksimumkort**
Prísur: 62,- kr



**Sjálvklistrandi hefti**
Prísur: 144,- kr

# Atkvøð á www.stamps.fo fyri:

# Ársins frímerki

Vel vakrasta frímerkið og tú ert við í lutakastinum um spennandi vinningar. Seinasta freist at atkvøða er 30. november 2022.




FO 973




FO 974




FO 971




FO 981




FO 982




FO 983




FO 984




FO 985




FO 986




FO 987




FO 975




FO 976




FO 979




FO 980




FO 990




FO 991




FO 972




FO 977-978




FO 988-989

24. oktober 2022

# Árbók & ársmappa

Árbók og ársmappa, sum vanliga verða send í november, verða nú send tykkum seinast í oktober saman við seinastu frímerkjaútgávuni, sum er tann 24. oktober.

## Árbókin 2022

Árbókin savnar allar ársins frímerkjaútgávur og saman við frímerkjunum fært tú áhugaverdu søguna aftanfyri hvørja útgávu lýsta við greinum og vøkrum myndum.

Tekstirnir í hesi snøggu bók eru á donskum, týskum og enskum og hóskar bókin seg tí sera væl sum gáva til vinir og kenningar uttanlands.

Ársins frímerki mynda m.a. Margretu drotning, norðlýsi, Kalsoy, og fyrstu bókina á føroyskum.

Frímerkini eru sett í lummar, sum verja tey væl.

Eins og seinastu árini er eitt ókeypis eintak av einum svart-prenti í árbókini. Svartprentið varð givið út, í sambandi við at Margreta drotning II hevði verið á trónuni í hálva øld.

Virðið á svartprentinum er 150,- kr.

## Ársmappan 2022

Kundi tú hugsað tær at keypt øll ársins frímerki skjótt og ómakaleyst?

So er hetta rætta loysnin. Í ársmappuni eru øll frímerki og smáørk, ið eru givin út í ár. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.




Árbók 2022
við ókeypis svartprenti.
Prísur: 665,- kr




Ársmappa 2022
Pris: 634,- kr



## Heftimappa 2022

Í mappuni ery tey trý sjálvklistrandi frímerkjaheftini, sum eru givin út í ár.

Myndevnini erur Kalsoy, Europa 2022 umframt jól og advent.

Prísur: 432,- kr




## FDC mappa 2022

Allir fyrstadagsbjálvar við røð og fyrstadagsbjálvar við smáarki, sum eru givnir út í 2022, eru við í mappuni - í alt 10 bjálvar.

Prísur: 684,- kr

## Jólamerkini 2022

# Stuðla børnum

Jólamerki og jólakort verða somuleiðis send saman við ársins seinastu frímerkjaútgávu tann 24. oktober.

### Jólamerkini 2022

Listamaðurin, Bárður Dal Christiansen hevur sniðgivið ársins jólamerkjaark, sum hevur heitið *Jólaleikur_v.22a*. Hetta er ein sonevnd kollasja av søguligum myndum, tekningum og grafikki, sum á ein sýraðan hátt mynda klassiska jólaleikin.

Bárður Dal Christiansen er ein av okkara sera virknu listafólkum. Hann hevur verið við á fleiri framsýningum bæði heima og uttanlands.  Bárður arbeiðir mest við figurativari málningalist, tekning, linoleumsskurðum og grafikki. Hann starvast eisini sum arkitektur og hevur sett á stovn listaverkætlanina "Gøtulist", sum m.a. fæst við gøtulist, list í almenna rúminum og húsaprýðing.

Avlopið av søluni av jólamerkjaarkinum fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

15 jólamerki eru í arkinum og hvørt ark kostar 30,00 kr.

### Jólakort

Trý dupult jólakort verða eisini til keyps. Jólakortini verða seld sum sett við trimum kortum og bjálvum.

Prísur: 30,00 kr. settið.




## Jólaleikur_v.22a

Tíðin rennur sum megabytes í einum LAN kápli. Vit eru stødd, har tað lekur úr framtíðini í tað farna. Mentan, vitan og siðvenjur verða downloadaðar úr skýnum og reka fram fyri okkum, sum skjótt-gangandi brot úr tí talgilda heiminum og inn í okkara abstrakta og analoga heim.

Jólaklipp, músaklikk, brendar fløgur og mandlur fortelja okkum, at hátíðin nærkast í hvørjum, og vit eru við via 5G og fipurnet í Føroyum. Tað eru 2022 ár síðan, frelsarin varð borin í heim, og hetta gleðast vit um í hesi tíð við samveru, swipes og sangi.

Stjørnan skínur sum ein 8K skermur á tí flotta grøna jólatrænum, og minnur okkum á at vera takksom fyri tað brátt farna, og gleðast um tað, sum alheimurin hevur í væntu.

*Bárður Dal Christiansen*

# Hesi frímerki ganga út í juli 2022

# Endasøla

Seinasti søludagur fyri hesi frímerki og frímerkjavørur er 3. juli 2022. So her er ein seinasti møguleiki at ogna tær hesar vørur fyri áljóðandi virði. Bílegg lætt og skjótt á www.stamps.fo ella send okkum bíleggingarlepan í blaðnum.




Flugur. PPS000218




Havnar Sjónleikarfelag. PPS000418




H.C. Müller
PPA000876




Føroysk klæðir III. PPA010918*

*Sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum. PPN000918.




Fuglafjarðar kommuna 100 ár. PPA020418




Europa 2018: Brýr. PPA010418*

*Sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum. PPN000418.




Makrelur. PPA000884




Sandsvatn og Toftavatn. PPA010218*

*Sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum. PPN000218.




Sepac 2018.
PPA000883




Halgimyndir. PPA020918




Regin Dahl. PPA000893




Árbók 2017




Heftimappa 2017




Ársmappa 2017




FDC-mappa 2017






| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nýggj útgáva:** | **Mineral og grótsløg** | **Jól og advent** | **Jólamerki 2022** |
| **Útgávudagur:** | 24.10.2022 | 24.10.2022 | 24.10.2022 |
| **Virði:** | 29,00 og 43,00 DKK | 19,00 og 29,00 kr | 30,00 DKK |
| **Nummar:** | FO 988-989 | FO 990-991 | |
| **Stødd, frímerki:** | 30 x 40 mm | 30 x 40 mm | 30 x 35 mm |
| **Stødd, smáark:** | 100 x 70 mm | | 165 x 130 mm |
| **Myndir / listafólk:** | Jarðfeingi | Heiðrik á Heygum | Bárður Dal Christiansen |
| **Prenthættur:** | Offset | Offset | Offset |
| **Prentsmiðja:** | bpost, Belgia | bpost, Belgia | Cartor Security Printers, Frakland |
| **Postgjaldsbólkur:** | Innanoyggja bræv og brævpakki, 0-100 g. | Bræv innanoyggja og til útheimin, 0-100 g. | |
| **Aðrar vørur:** | | Sjálvklistrandi hefti við 2x3 frímerkjum og 2 postkort. | |







| | | |
|---|---|---|
| **Útgáva:** | **Ársmappa 2022** | **Árbók 2022** |
| **Útgávudagur:** | 24.10.2022 | 24.10.2022 |
| **Prísur:** | 634,00 kr. | 665,00 kr. |
| **Nummar:** | FO 971-991 | FO 971-991 |
| **Stødd:** | 235 x 202 mm | 240 x 220 mm |
| **Prentsmiðja:** | Trykteam, Danmark | Føroyaprent |
| | | Ókeypis svartprent við |

Frímerkini eru bert royndarprent og ikki altíð endalig.

**Vørurnar kunnu bíleggjast á www.stamps.fo uml. 1 mánað áðrenn útgávudagin.**

**Layout:** Posta Stamps
**Perma:** Kalsittholan
**Mynd:** Finnur Justinussen
**Prent:** TrykTeam, Danmark
ISSN 1603-0036

Posta Stamps
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

**Tlf.** 346200
stamps@posta.fo
**www.stamps.fo**

@FaroeIslandsStamps
@faroeislandsstamps
@FaroeseStamps

# Nýtt

## Nýggj mappa við postgjaldsmerkjum ATM #3

Í hesi triðju snøggu mappuni eru fimm sett av postgjaldsmerkjum frá árunum 2018-2022 og eru evnini hesi: vitar, útróður, í hoyna, søgu-sigarar og almenn ferðsla. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.

GG - útgávudagurin er 01.08.2022, so vøran verður send eftir hetta.

**Prísur:** 276,00 kr.




## Davo Luksus album

Eitt vakurt goymslualbum, sum rúmar øllum føroyskum frímerkjum, smáørkum og heftum frá 2015-2022.

Góðskan er høg og leiðbeinandi myndir og tekstir eru á síðunum. Lummar eru at seta frímerkini í og verja soleiðis frímerkini á besta hátt. Kápan er úr myrkabláum kunstleðri og føroyska skjaldarmerkið er á forsíðu og baki.

Í albumminum eru síður til frímerkini fyri árini 2015-2022.

**Prísur:** 840,00 kr.




**Posta Stamps luttekur á hesum framsýningum:**
Frimærke, Brev & Postkort messe 2022, Valby Hallen, 12.-13. november, Valby, Danmark

Internationale-Briefmarkenbörse, ULM, 27.-29. oktober, Sindelfingen, Týskland

Posta FAROE ISLANDS

# Bíleggingarlepi – Posta Stamps nr. 52



| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 24.10.2022 – Mineral & grótsløg – FO 988-989 (smáark við 2 frímerkjum)** | | | | | | |
| PPS001022 | Mineral, óstemplað | * | 72,00 | 10,00 | | |
| FFT001022 | Mineral, fdst. | ⊙ | 72,00 | 10,00 | | |
| DDT001022 | Mineral, dagstemplað | ⊙ | 72,00 | 10,00 | | |
| FFU001022 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ⊙ | 77,00 | 10,80 | | |
| **Útgáva 24.10.2022 – Jól og advent – FO 990-991 (2 frímerki + hefti)** | | | | | | |
| PPA011022 | Jól og advent, røð óstemplað | * | 48,00 | 6,70 | | |
| FFG011022 | Jól og advent, røð fyrstadagstemplað | ⊙ | 48,00 | 6,70 | | |
| DDG011022 | Jól og advent, røð dagstemplað | ⊙ | 48,00 | 6,70 | | |
| PPN011022 | Frímerkjahefti, óst. | * | 144,00 | 20,15 | | |
| FFO011022 | Frímerkjahefti, fdst. | ⊙ | 144,00 | 20,15 | | |
| DDO011022 | Frímerkjahefti, dgst. | ⊙ | 144,00 | 20,15 | | |
| PPJ011022 | Postkort (2) | * | 14,00 | 1,95 | | |
| FFJ011022 | Maksimumkort (2) | ⊙ | 62,00 | 8,70 | | |
| FFK011022 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ⊙ | 53,00 | 7,40 | | |
| FFL011022 | Fyrstadagsbjálvi v/einkultmerkjum | ⊙ | 55,00 | 7,70 | | |
| FFM011022 | Fyrstadagsbjálvi v/fýrablokkum | ⊙ | 199,00 | 27,80 | | |
| FFP011022 | Fyrstadagsbjálvi v/hefti | ⊙ | 149,00 | 20,80 | | |
| PPB011022 | 4-bl, ovari marginal. óst. | * | 192,00 | 26,90 | | |
| PPC011022 | 4-bl, niðari marginal. óst. | * | 192,00 | 26,90 | | |
| PPD000990 | Jól og advent, ark 19KR (20) | * | 380,00 | 53,20 | | |
| PPD000991 | Jól og advent, ark 29KR (20) | * | 580,00 | 81,20 | | |
| **Útgáva 24.10.2022 – Jólavørur** | | | | | | |
| WPPE02022 | Árbók 2022 | * | 665,00 | 93,00 | | |
| PPY002022 | Ársmappa 2022 | * | 634,00 | 89,00 | | |
| PPX002022 | Jólamerki 2022 | * | 30,00 | 4,20 | | |
| WJOJ02022 | Jólakort 2022 (3 v/ bjálvum) | * | 30,00 | 4,20 | | |
| **Heftimappur** | | | | | | |
| WHEM02022 | Heftimappa 2022 | * | 432,00 | 60,50 | | |
| WHEM02020 | Heftimappa 2020 | * | 327,00 | 45,80 | | |
| **Mappur við fyrstadagsbjálvum** | | | | | | |
| WFDM02022 | FDC-mappa 2022 | ⊙ | 684,00 | 95,80 | | |
| WFDM02021 | FDC-mappa 2021 | ⊙ | 625,00 | 87,50 | | |

* = óstemplað, ⊙= stemplað

# Send inn ella bílegg á www.stamps.fo



| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **DAVO luksus album við síðum og eyka síður** | | | | | | |
| LUA002022 | Album við síðum 2015-2022 | | 840,00 | 117,60 | | |
| LUA002014 | Album við síðum 2001-2014 | | 975,00 | 136,50 | | |
| LUA000003 | Album uttan síður | | 225,00 | 31,50 | | |
| LUS002022 | Síður til album 2022 | | 130,00 | 18,20 | | |
| LUS002021 | Síður til album 2021 | | 130,00 | 18,20 | | |
| LUS002020 | Síður til album 2020 | | 130,00 | 18,20 | | |
| JOS002022 | Síða til jólamerki 2022 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002021 | Síða til jólamerki 2021 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002020 | Síða til jólamerki 2020 | | 30,00 | 4,20 | | |
| **Endasøla - hesar vørur ganga út 3. juli 2022** | | | | | | |
| PPS000218 | Flugur, *smáark* | * | 48,00 | 6,70 | | |
| PPA000876 | H.C. Müller 200 ár | * | 18,00 | 2,50 | | |
| PPA010218 | Sandsvatn og Toftavatn | * | 30,00 | 4,20 | | |
| PPN000218 | Sandsvatn og Toftavatn, *hefti* | * | 90,00 | 12,60 | | |
| PPS000418 | Havnar Sjónleikarfelag, *smáark* | * | 38,00 | 5,30 | | |
| PPA000883 | Sepac 2018: Spectacular views | * | 20,00 | 2,80 | | |
| PPA000884 | Norden 2018: Makrelur | * | 18,00 | 2,50 | | |
| PPA010418 | Europa 2018: Brýr | * | 28,00 | 3,90 | | |
| PPN000418 | Europa 2018: Brýr, *hefti* | * | 84,00 | 11,70 | | |
| PPA020418 | Fuglafjarðar kommuna 100 ár | * | 36,00 | 5,00 | | |
| PPA000893 | Regin Dahl 100 ár | * | 28,00 | 3,90 | | |
| PPA010918 | Føroysk klæðir III | * | 38,00 | 5,30 | | |
| PPN000918 | Føroysk klæðir III, *hefti* | * | 114,00 | 16,00 | | |
| PPA020918 | Halgimyndir | * | 28,00 | 3,90 | | |
| PPY002017 | Ársmappa 2017 | * | 445,00 | 62,30 | | |
| WPPE02017 | Árbók 2017 | * | 475,00 | 66,50 | | |
| WFDM02017 | FDC-mappa 2017 | ⊙ | 515,00 | 72,00 | | |
| WHEM02017 | Heftimappa 2017 | * | 270,00 | 37,80 | | |
| **Ymiskt** | | | | | | |
| WPMAMAP03 | Mappa við postgjaldsmerkjum #3 | | 276,00 | 38,60 | | |
| | | | | | | |
| | **Avgreiðslugjald:** | | **25,00** | **3,50** | **1** | **25,00** |
| | | | | **Prísur í alt:** | | |

Vinaliga fyllið út teigarnar aftanfyri ›

**Kunning um gjald við gjaldskorti**

Altjóða trygdarásetingin, sonevnda "2-parta-góðkenningin" ger, at vit ikki kunnu handfara gjaldskort eins og áður.

Í staðin bjóða vit eina trygga loysn, har tú kanst rita inn á okkara heimasíðu og skráseta títt gjaldskort. Á hendan hátt kanst tú lætt og trygt gjalda fyri bæði tíni framtíðar hald eins og fyri einkultar bíleggingar.

Tað ber tó eisini til at bíleggja frímerki á www.stamps.fo og gjalda við gjaldskorti uttan at kortið verður skrásett.

Nýggjar útgávur og vørur eru vanliga klárar at bíleggja umleið ein mánaða fyri útgávudagin.

**Gjaldshættir**

☐ Upphæddin verður flutt á konto nr. 9870 4271212 hjá Posta Stamps

Vinarliga upplýs kundanummar, tá bílagt og goldið verður.

Allar vørur kunnu lættliga bíleggjast á heimasíðu okkara www.stamps.fo. Goldið verður við gjaldskorti og vøran verður send við postinum.

→ Atkvøð fyri ársins frímerki á www.stamps.fo, við telduposti ella send hendan lepan til okkara. Freistin fyri at luttaka er 30. november 2022.

**Ársins vakrasta frímerki 2022:** FO

Navn:

Bústaður:

Postnr./Býur:

Land:

Teldupostur:

Kundanr.:

☐ Ja, takk. Eg vil fegin fáa tíðindaskriv umvegis teldupost.

**Posta Stamps**
**Óðinshædd 2**
**100 Tórshavn**

**Tlf. 346200**

**stamps@posta.fo**
**www.stamps.fo**

PS2022